Nr. 8/2019

Rósa Samuelsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um MVG-endurrindan til hitapumpur, settur landsstýris-manninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu nógv hava gjørt nýtslu av møguleikanum at fáa endurrindað MVG fyri uppseting av hitapumpum, síðan lógin kom í gildi, býtt upp á ár og økir í landinum?

2. Hvussu nógv er talan um í krónum, býtt upp á ár og økir í landinum?

3. Ber til at siga, at ferð er sett á at fáa fólk/ húsarhald at leggja um til hitapumpur, grundað á MVG-endurrindan?

4. Er landsstýrismaðurin sinnaður at leingja skipanina um MVG-endurrindan til el-riknar hitapumpuskipanir, sum gongur út 31.12.2019?

Viðmerkingar:
Verandi lógaráseting um endurrindan av MVG til hitapumpur fer úr gildi 31. desember 2019.

Endamálið við lógini um endurrindan av MVG fyri hitapumpur, sum bleiv samtykt 30.05.17, var at fáa sett ferð á at leggja um til grøna orku, eitt stig til at røkka ítøkiliga málinum um, at í minsta lagi helvtin av sethúsum og bygningum skulu verða hitað við el frá varandi orkukeldum.

Tað eru kortini fleiri, sum enn ikki hava havt møguleikan at útvega sær hitapumpur, tí tað er mangul uppá hondverkarar og bara eitt felag borar jarðhitahol, og tí er trupult at sleppa í gongd at byggja og eisini at leggja um til nýtslu av hitapumpum.

Fleiri eru nú í bíðistøðu fyri at koma í gongd, og áhugin fyri hitapumpum og jarðhita er sera stórur. Sostatt er umráðandi, at hildið verður fram við skipanini við endurrindan av MVG fyri hitapumpur, og at skipanin veruliga fær møguleika og eitt neyðugt skotbrá at virka eftir endamálinum. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 14. oktober 2019

Rósa Samuelsen